# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit fremja okkara tiltøk, og vit heita staðiliga á onnur lond um at herða trýstið á stýrið í Iran (George W. Bush)*

# Áarførið tók fimm hús av grundini

Tað hevur verið rættiligt illveður í fleiri amerikonskum statum teir seinastu dagarnar. Summastaðni hevur tað regnað so illa, at áir og vøtn eru farin langt upp um bakkarnar, soleiðis at stór øki standa undir í vatni. Í statinum Wisconsin megnaði ein bygging við eitt vatn ikki at standa ímóti trýstinum. Úrslitið varð, at vatnið floymdi út um byggingina og tók fimm hús av grundini. George W. Bush, forseti, hevur lýst partar av Indiana sum vanlukkuøki, og tað sama hevur guvernørurin í Wisconsin gjørt.



# Aftur til arbeiðis

**Krabbameinssjúki filmsleikarin Patrick Swayze er farin aftur til arbeiðis**

Patrick Swayze, sum herfyri varð lagdur inn á sjúkrahús við krabbameini, hevur fingið loyvi frá læknunum at spæla við í einari sjónvarpsrøð, skrivar Hollywood Reporter.

Swayze, sum serliga er kendur fyri leiklutin í filminum "Dirty Dancing", skal spæla FBI-maður í einari røð, sum er í 13 pørtum. Upptøkurnar byrja í august.

Patrick Swayze hevur fingið kemoterapi og aðra viðgerð ímóti krabbameini, men hann sigur seg vera væl fyri til at fara undir tann nýggja leiklutin.



*Patrick Swayze skal aftur fyri upptøkutólið*

*Mynd: Polfoto*

# Bush til Evropa at siga farvæl

**George W. Bush er komin til Evropa á toppfund millum ES og USA. Ferðin er helst hansara seinasta sum forseti hesumegin Atlantshavið**

George W. Bush hevur fleiri týdningarmikil mál á dagsskránni, nú hann vitjar Evropa. Hann skal tosa við teir evropeisku leiðararnar um størri hjálp til Afghanistan, fleiri tiltøk ímóti Iran og veðurlagsbroytingarnar, og hvat kann gerast fyri at tálma avleiðingum teirra.

Í dag hevur Bush havt fund við formannin í ES-nevndini, Jose Manuel Barroso, og Janez Jansa, forsætisráðharra í Slovenia, sum hevur formansskapin í ES í løtuni. Eftir vitjanina í Slovenia skal Bush til Týsklands, Italia, Fraklands og Bretlands.

Høvuðsørindini hjá Bush eru sambært amerikonskum diplomatum at fáa ES at herða trýstið á stýrið í Iran, og tað er líkt til, at hann kann fáa undirtøku fyri hesum. USA hevur roynt at fáa ES at forða ávísum iranskum bankum atgongd til altjóða fíggjarheimin, og tann spurningin tekur Bush upp á ferðini.

Eygleiðarar vænta ikki nakað frambrot í tingingunum um veðurlagsbroytingarnar, tí ES hevur bestan hugin at bíða eftir forsetaskiftinum í Washington.



*George W. Bush á veg úr flogfarinum uttan fyri Ljubljana í Slovenia*

*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT



*Michael Bloomberg er borgarstjóri í New York*

*Mynd: Polfoto*

### Bloomberg fekk krakk

Borgarstjórin í New York, Michael Bloomberg, hevur boðið John McCain og Barrack Obama at halda tann fyrsta valdystin í tí søguliga bygninginum Federal Hall í New York, har tað fyrsta amerikanska tingið kom saman. Men hvørgin tók av tilboði hansara. McCain hevur í sínum lagi gjørt avtalu við sjón-varpið ABC um tíggju valdystir, men Obama vil ikki binda seg til nakra ávísa sjónvarpsstøð. Harafturímóti vóru tey bæði valevnini á einum máli um at havna tilboðnum frá Michael Bloomberg.

### Munur á løn

Hóast áralangt tos um somu løn til menn og kvinnur vísir ein nýggj kanning, at týskir menn fáa í meðal 22 prosent meiri í løn enn týskar kvinnur. So stórur er munurin ikki nakra aðrastaðni í ES. Lønarmunurin er størstur í Týsklandi, Estlandi, Slovakia og Kýpros, og í meðal er munurin í øllum limalondunum 15 prosent. ES sigur í einari viðmerking til kanningarúrslitið, at tað er eitt vandamál, at kvinnur ikki fáa somu løn sum menn, og at tað ræður um at geva kvinnunum størri part av arbeiðsmarknaðinum. Kanningin vísir, at 91 prosent av monnunum í ES-londunum arbeiða uttan fyri heimið, meðan tað tilsvarandi talið hjá kvinnunum er 62 prosent.